# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*11. mars fingu Vivie Kirke Petersen, Vági, búsitandi í Keypmannahavn, og Bárður Davidsen, Hósvík, tvíburar. Gentan vigaði 2090 gr og var 42 cm long og drongurin vigaði 2039 gr og var 46 cm langur. Her er tað stórasystir Angela, ið situr undir lítlusystur Ronju og lítlabeiggja Ronnie.*



*5. apríl fingu Gunnvá Garðalíð Jacobsen og Kári Larssen, Skive, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3380 gr.*
*Lítla fitta gentan eitur Eydna.*

17. mars fingu Eydna og Kári Johansen, Hirtshals, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3330 gr.

9. apríl fingu Ingun og John Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3100 gr.

13. apríl fingu Turid og Bogi Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur úr Hvítarusslandi. Hon eitur Anastasija og er fødd 23. november 2002.

13. apríl fingu Anni og Jógvan Thomsen, Hvalba, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3850 gr.

13. apríl fingu Bettina Bonde og Carl Johan H. Simonsen, Århus, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

15. apríl fingu Barbara Brattalíð og Bjarni Hammer, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 3080 gr.

16. apríl fingu Majbritt og Sveinbjørn Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3500 gr.

17. apríl fingu Svanna Jákupsdóttir, Hoyvík og Meinert J. Olsen, Vestmanna eina dóttir. Hon vigaði 3350 g og var 54 cm long.

17. apríl fingu Karin Maria Djurhuus og Rúni Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4250 gr.

17. apríl fingu Hildur og Eyðun Samuelsen, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2860 gr.

18. aprí lfingu Elida Poulsen og Eyðun Berg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3550 gr.

18. apríl fingu Maibrit Wernicke og Morten Larsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2800 gr.

19. apríl fingu Sunvá og Sjúrður Kass, Strondum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3450 gr.

19. apríl fingu Hansa Maria og Petur Hans Hansen, Nesi, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

19. apríl fingu Vivi Wang og Eli Jákupsson, Sandavági, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4450 gr.

20. apríl fingu Turið av Teiginum Jacobsen og Eirikur Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3750 gr.

20. apríl fingu Erla W. og Theodor Erling Johannesen, Runavík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

20. apríl fingu Kitty May Ellefsen og Óli Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4100 gr.

21. apríl fingu Guri Knudsen og Høgni Andersen, Skála, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

21. apríl fingu Johanna Jonhardsdóttir og Brynjolv Gert Nicolajsen, Skopun, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3750 gr.

21. apríl fingu Annfríð og Jan Herman Hansen, Rituvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3600 gr.

22. apríl fingu Anna Maria og Jákup Nolsøe, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3425 gr.

## Siloakórið í Ebenezer Flaggdagin



Sangkórið í Siloa í Fuglafirði fer at syngja á evangeliska fundinum í Ebenezer sunnukvøldið kl 18.

Tað er í heimasamkomuni, Siloa, tey vanliga bera gleðiboðskapin fram við sínum góða og hutakandi sangi. Men tey ferðast eisini bæði innan- og uttanlands, og hava nýliga verið í Aberdeen og sungið. Nú er so túrurin komin til Ebenezer í Havn.

Sangúrvalið er ein góð blanding av gomlum og kendum sangum, umframt nýggjari og meira rútmiskum sangum - við og uttan ljóðføri. Vit hoyra eisini nakrar framúr solorøddir eins og eina yndislig trio.

Siloakórið er mannað við sangarum ymsastaðni úr Eysturoynni. Kórleiðari er Eyðun á Lakjuni.

## Úlvadagur á Argjum

24. apríl verður Úlvadagur. Hesaferð á Argjum. Hetta er eitt tiltak, ið er á hvørjum ári og verður skipað av KFM Skótunum í Føroyum. Endamálið við tiltakinum er at savna úlvar úr øllum landinum á einum stað, at luttaka í ymsum spennandi virksemi so sum skattajakt, klintring, karrusel, sigling við gummibáti og mangt annað. Tey luttakandi børnini eru í aldrinum 1.–4. flokk.

Tiltakið byrjar leygarmorgunin kl. 10.00, har øll savnast í skúlagarðinum á Argjum. Síðani verða úlvarnir saman við leiðarunum sendir út á tey ymsu støðini, har tey áðurnevndu tiltøkini verða. Úlvadagurin endar leygardagin kl. 16.30 í Sandagerði, har øll savnast um eitt legubál. Har fara vit at hava felgssang og skemt.

Vónandi verður úlvadagurin aftur í ár eitt væleydnað tiltak. Væntandi verða einir 250 úlvaungar umframt leiðarar og fyriskiparar, ið luttaka leygardagin tann 24.

## Kiwanis-hjálmar í Norðoyggjum



*Fyrsti flokkur í skúlanum á Fossánesi hevur fingið Kiwanis-hjálmar. Aftara rað f.v. Sámal Bláhamar frá Kiwanis, Simona Johannesen, lærari, Poul Jacob Zachariasen, fyrsti lærari við skúlan, og Helge Nielsen frá Kiwanis. Framman fyri eru teir seks næmingarnir í fyrsta flokki*

TÍÐINDASKRIV

Seinasta týsdag vóru fólk frá Kiwanis í Norðoyggjum og vitjaðu teir ymisku skúlarnar, har tey deildu út Kiwanis-hjálmar til næmingarnar í fyrsta flokki

Vitjað varð á skúlunum í Klaksvík, Haraldsundi, Fossánesi og á Viðareiði. Børnini tóku væl ímóti hjálmunum.

Hetta var sama dag sum fyrsta skotið varð latið av til undirsjóvartunninin í Klaksvík, og Sámal Bláhamar frá Kiwanis, sigur, at teir sóu fleiri 1. floksnæmingar ganga við Kiwanishjálmi á høvdinum við nýggja tunnilsmunnan.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Bjarni Skaalum 80 ár



Í dag, 24. apríl, fyllir Bjarni Skaalum 80 ár. Hann er lærari og høvundur. Foreldrini vóru Christiana f. Joensen úr Hvalba og Einar Skaalum úr Vági.

Bjarni Skaalum tók lærarapróg v á Jonstrup Seminarium í 1950, og seinni tók hann prógv sum smíðlærari á Dansk Sløjdlærerskole. Haraftrat las hann til orðblindalærara og fekk góðkenning sum slíkur í 1955.

Eftir at hava lokið prógv gjørdist Bjarni Skaalum lærari í Porkeri í 1950. Har var hann, til hann tók við sum lærari í Vági í 1969. Hann fór frá við eftirløn í 1991. Hann giftist í 1945 við Elsebeth Marie Vinther úr Vági. Tey fingu fimm børn, fýra synir og eina dóttur: Hjalti, Einar, Allan, Tórð og Annika Yvonna.

Mong munna kenna Bjarna Skaalum sum rithøvund. Hann hevur javnan áhugaverdar greinar í Skáanum í Dimmalætting um fjølbroytt evni. Hann hevur eisini týtt ein hóp, eitt nú skaldsøguna Moby Dick. Sambært Rithøvundabókini er tað mesta, hann hevur skrivað, handrit, sum ikki eru givin út, tó eru trý handrit givin út í bók.

Hann hevur eisini yrkt sálmar og sangir. Í Songbók Føroya Fólks eigur hann sangin "Náttin hvarv og dimmið leið". Hann hevur skrivað nógv í Sunnudagsblaðnum og Barnatíðindum, sum Jákup Berg gav út.

## Dagurin

**24. apríl. Albertus**, deyður umleið ár 997. Biskupur í Prag.
Týska navnið merkir *edilingur* ella *lýsandi*.

**25. apríl. Flaggdagur Føroya**. Tað var tann 25. apríl í 1940, at studentaflaggið Merki varð viðurkent sum Føroya tjóðareyðkenni.
Tað gamla navnið á degnum er **markusarmessa**, til minnis um evangelistin Markus.
Týdningin av navninum er óvissur.

**26. apríl. Cletus,** deyður umleið ár 90. Cletus ella Anacletus var triði maður í pávastóli eftir Pætur.

Gunvør Jensen, Tórshavn:

## Seinasta starvsdag eftir 40 ár á Tjaldurs Apoteki

Mikudagin 21. apríl 2004 hevði Gunvør Jensen í Havn sín seinasta starvsdag á Tjaldurs Apoteki í Havn eftir at hava arbeitt har í 40 ár.

Gunvør er úr Havn, hon gekk í barnaskúla í Santa Frants Skúla, síðan tók hon real- og preliminerprógv, áðrenn hon fór í læru sum defektrisa, ella farmakonom, sum tað eitur í dag, á Tjaldurs Apoteki við Áarvegin í september 1963.

Hon hevur arbeitt á Apotekinum síðan tá, har hon hevur havt ymiskar arbeiðsuppgávur, m.a. við reseptavgreiðslum.

Gunnvør er dóttir Ásu, f. Isholm, og Johannes Johannesen, bæði úr Havn. Hon giftist í 1965 við Frode Tvermoes Jensen, úr Keypmannahavn, sum tá arbeiddi í Mjørkadali. Tey eiga trý børn: Niels, sum býr í Danmark, og Bjørg og Kristin, sum búgva í Havn.

3. mai flytur familjan til Danmarkar at búgva, húsini í Fjalsgøtu eru seld, og tey hava keypt onnur hús í Bording, tætt við Ikast, nærhendis Silkeborg.



## Andlát

14. apríl
Vilhelm Sigfred Vilhelmsen, úr Tórshavn búsitandi í Brønshøj, 75 ár.

15. apríl
Vinnie Godtfred, búsitandi í Revlingbakken Aalborg, 62 ár.

17. apríl
Solveig Inga Sofía Olsen, fødd Einarsson, búsitandi í Tórshavn, ættað úr Rituvík,74 ár.

18. apríl
Jógvan Øregaard, Fuglafjørður, vanliga nevndur Jógvan á Lakjuni, 83 ár.

19. apríl
Liljan Múller, Øravíkarlíð, 59 ár.
Helgofinn Larsen, fyrrverandi bakarameistari í Klaksvík, 78 ár.
Karin Isaksen, Norðragøta, 83 ár.

20. apríl
Súsanna Joensen, ættað úr Skálavík búsitandi í Tórshavn, 81 ár
Viggo Kjærbo úr Sumba,83 ár.

21. apríl
Hjelm Jacobsen, ættaður av Oyrabø í Vági, búsitandi í Herfølge, 87 ár.

## Gullbrúdleyp

Í dag, 24. apríl, hava Elin Dahl Johannesen og Ásmund Johannesen í Havn gullbrúdleyp. Tey eru stødd hjá soninum Paula í Sandagerði, Engumvej 21, Bredal, 7120 Vejle Ø.

## Brúdleyp

Í dag, 24. apríl, kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Hansi í Kálvalíð, Tórshavn, og Súni Jacobsen, Haldórsvík. Kl. 18.00 verður borðhald fyri innbodnum í Starvsmannafelagshúsinum, J. H. Schrøtersgøtu 9. Eftir kl. 21.00 er opið hús, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 24. apríl, kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Hallfríð Hammer, Toftum, og Rúni í Hjøllum, Saltnes. Kl. 18.00 verður borðhald fyri innbodnum á Sjómansheiminum í Runavík. Eftir kl. 21.00 er opið hús hjá Klement Hammer, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Flaggdagshald í Fámjin

Sunnudagin verður flaggdagshald í Famjin. Ein av teimum, ið var við til at gera Merkið á sinni, var úr Famjin og er júst hetta flagg at síggja í kirkjuni í bygdini

Sunnudagin 25. apríl klokkan 16:30 verður flaggdagshald í Famjin. Magnus Magnussen heldur røðu, Tvøroyrar Hornorkestur spælir og Ljómur syngur. Aftaná verður drekkamuður í Vesturhøll og øll eru hjartaliga vælkomin.

Ein teirra, ið á sinni var við til at gera føroyska flaggið, Merkið, var J.O. Lisberg, ið var úr Famjin. Í dag sæst júst hetta flagg í kirkjuni í Famjin og tað er kanska forvitnisligt hjá teimum, ið hava søguligan áhuga og ikki hava vitjað kirkjuna áður.

Í ár eru 85 ár síðani flaggið á fyrsta sinni veittraði í Famjin.

## Flaggdagshald í Vágum

Flaggdagshald verður í fimleikarhøllini í Sørvágs skúla sunnudagin 25. apríl kl. 14.00 og á Giljanesi kl. 15.30.

Vága Ríðingarfelag saman við skúlabørnum skipa fyri skrúðgongu. Farið verður úr skúlanum í Sørvági kl. 13.45 og úr skúlunum í Sandavági og Miðvági kl. 15.00.

Sørvágs Tónleikarfelag undir leiðslu av Steven Foggin spælir undir flaggdagshaldinum.

Finnur Helmsdal løgtingsmaður, heldur flaggrøðuna.

## Flaggdagshald á Oyrarbakka

Sunnudagin 25. apríl kl. 15.00 skipar skótaliðið Knúkur fyri flaggdagshaldi á Oyrarbakka.

Sámal í Skorini rektari flytur fram røðu. Norðljómur spælir og Sundalagskórið syngur.0

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sigga M. Jönsson**
Tvøroyri

doyði og varð jarðað.

Eina hjartans tøkk til starvsfólkini á Ellis- og Røktarheiminum fyri at tit tóku tykkum so væl av henni øll árini og øllum tykkum, ið so trúliga vitjaðu hana.
Eina serliga tøkk til tykkum í meinigheitini fyri hjálpsemi í samband við jarðarferðina.
Takk fyri blómur, kransar og heilsanir og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til gravar.

*Familjunnar vegna*

**Frank, Rudy og Rikvør**